TIL ARBEIÐIS

LAGT TIL RÆTTIS: Vilmund Jacobsen, vilmund@sosialurin.fo


Inga Eyðunsdóttir skipaði fyri skúmblandingini, tá tveir menn vórðu settir umborð á Athenu seinnapartin týsdagin


MYND: JENS KRISTIAN VANG

FAKTA:

**Navn:** Inga Eyðunsdóttir
**Starv:** Deildarleiðari og sløkkiliðsfólk
**Besta við starvinum:**
At tú ikki veitst, hvat dagurin hevur at bjóða
**Ringasta við starvinum:**
Tungt at koma upp á morgni
**Starvsfólk:** (Ansni) Sløk 30
**Stjóri:** Helgi Justinussen

# Lívið í hondunum hjá hvørjum øðrum

**INGA EYÐUNSDÓTTIR** VAR **PARTUR** AV FUGLAFJARÐAR **SLØKKILIÐI** Á OLJUBRYGGJUNI HJÁ RUNAVÍKAR **HAVN**, TÁ TVEIR MENN **SEINNAPARTIN** TÝSDAGIN VÓRÐU SETTIR **UMBORÐ** Á **ATHENU** AT SLØKKJA **ELD** OG **KØLA** SKIPIÐ NIÐUR. HON ER **ANNARS** Í FØSTUM **STARVI** HJÁ **ANSNI**, HAR HON ER **DEILDARLEIÐARI** Á TÆNASTUDEPLINUM HJÁ **TRYGDARFELAGNUM**

Hon er ung, hon er vøkur, og henni dámar nýggjar avbjóðingar hvønn dag. Í meiri enn 10 ár hevur hon verið knýtt at trygdarfelagnum Ansni, og tað mesta av trimum árum hevur hon eisini verið knýtt at Fuglafjarðar Sløkkiliði.

– Í løtuni eri eg einasta kvinna í Fuglafjarðar Sløkkiliði, men eitt skifti vóru vit tvær. Hin, Gvøðbjørg Abrahamsen, er flutt úr kommununi, og er tí ikki longur partur av sløkkiliðnum.

Inga Eyðunsdóttir, sum er fødd í 1981, er ættað úr Saltangará. Hon býr ikki í Fuglafjarðar kommunu, men í Norðragøtu í Eysturkommunu, har hon er gift havnarmanninum, Jon Johnsson.

– Vit búgva so mikið nær kommunumarkinum til Fuglafjarðar kommunu, at tíðin til tilkalling er innan fyri neyðugu karmarnar.

Inga er fødd Joensen, er dóttir Eyðun og Helen. Eyðun er kendur sum maðurin, ið hevur átt og rikið Radiobúðina í Saltangará í mong ár.

– Mítt eftirnavn er Eyðunsdóttir eftir pápa mínum, og maður mín hevur eftirnavnið eftir pápa sínum, sigur hon.

## Ymiskar uppgávur

Inga arbeiðir sum deildarleiðari á tænastudeplinum og í Eysturoyar økinum hjá Ansni.

– Fyri tað mesta eri eg á skrivstovuni í Havn, men í einum slíkum starvi er eisini neyðugt at vera fleksibul. Eg eri ikki fast á tímatalvuni til ymisku ruturnar, sum vit koyra, men stendur á, eri eg eisini tøk til hesar uppgávur.

Hon leggur aftrat, at Ansni sum trygdarfelag hevur til endamáls – saman við viðskiftafólki sínum – at betra um trygdina.

– Hetta gera vit við at seta saman trygdarloysnir, ið hóska til einstøku viðskiftafólkini. Við góðum og væl upplærdum trygdarfólki og tøkningum leggja vit stóran dent á at veita okkara viðskiftafólkum bestu trygd og tænastu, sigur Inga.

Hon leggur aftrat, at tøkniligi parturin hjá Ansni bjóðar ráðgeving, sølu/ leigu og uppsetan av ymiskum tænastum innan trygdarøki.

– Talan er soleiðis um eitt nú ávaringarskipanir, vakmyndatól umframt aðrar tøkniligar trygdarloysnir, sigur hon.

## Sløkkiliðsfólk

Inga Eyðunsdóttir var partur av Fuglafjarðar Sløkkiliði á oljubryggjuni hjá Runavíkar havn, tá tveir menn seinnapartin týsdagin vórðu settir umborð á Athenu at sløkkja eld og køla skipið niður.

– Vit vóru fimm fólk hjá Fuglafjarðar Sløkkiliði, sum komu út at taka hond í við Skálafjarðar Sløkkiliði. Okkara sløkkilið hevur góða útgerð, og við okkum høvdu vit eitt nú stiðjabil, sum tørvur var á til hesa uppgávu. Vit høvdu eisini sproytu, bjargingarbil og tangabil.

Meðan Sosialurin fylgdi arbeiðnum á oljubryggjuni og var til steðgar, tá tveir menn vórðu settir umborð á Athenu, skipaði Inga fyri skúmblandingini.

– Nei, eg var ikki óttafull, tá menn fóru umborð. Undir slíkum umstøðum skal alt gerast við fyrivarni og fyriliti, og eg taki uppgávurnar, sum tær koma. Tá tú ert partur av einum sløkkiliði, er hetta eitt arbeiði, sum skal gerast.

Inga hevur fyrireikað seg væl sum sløkkiliðsfólk.

– Eg havi tikið øll skeið, sum kunnu takast. Havi soleiðis tikið eitt nú roykkavaraskeið, skeið í neyðviðgerð og skeið í at klippa bilar eftir ferðsluvanlukkur.

Hon er eisini kavari, og hon undirvísir eisini í kaving á Kavarasskúlanum.

– Sum eg nevndi, eigur Fuglafjarðar Sløkkilið nógva útgerð, men tað er eisini ógvuliga umráðandi, at fólkið hevur neyvan kunnleika og er ført fyri at brúka útgerðina.

Inga sigur, at samanhaldið millum sløkkiliðsfólk er sera gott, og hon trívist væl í hesum umhvørvi, tó at hetta ikki er eitt arbeiði, sum nógv konufólk luttaka í.

– Vit eru saman av og á og halda soleiðis venjingina við líka, og sum sløkkiliðsfólk er neyðugt at vera væl fyri likamliga, tí tú veitst jú ongantíð, nær tú stendur yvirfyri likamliga krevjandi uppgávum.

## Spennandi og mennandi

Inga Eyðundóttir dámar sera væl at arbeiða hjá Ansni, og henni dámar eisini ógvuliga væl at vera knýtt at Fuglafjarðar Sløkkiliði.

– Hetta eru í báðum førum spennandi og mennandi arbeiði, og hvørt dagur hevur sínar ókendu avbjóðingar. Hetta eru uppgávur sum gera, at tú ert motiverað og heldur teg í góðum likamligum formi. Sum sløkkiliðsfólk noyðist tú at stóla lívið upp á hvønn annan, sum Inga Eyðunsdóttir tekur til.